

# Veri hjartaliga vælkomin til Klaksvíkar

**Við so mongum virkisfúsum fólkum bæði vinnuliga og mentanarliga, eigur Klaksvík eina bjarta framtíð**



### Klaksvík bjóðar av

Broytta ferðasambandið er fyrsta og fremst ein kollvelting fyri okkum hesu megin fjørðin. Avbjóðing og stevnumið okkara er og verður í framtíðini ógvuliga umráðandi fyri okkum, at árinið frá okkara lokaløki – og tað, okkara lokaløkið hevur at bjóða – skal fara at merkjast so langt sum tilber inn á meginøkið.

### Er Klaksvík eitt lyklapláss?

Á nógvum lyklaplássum í lokalsamfelag okkara hava fólk brotið upp um armar. Onkustaðni er nýggj kós sett út í kortið inn á nýggjar spennandi leiðir. Ongar nýhugsanir kom av sær sjálvum – tær mugu skapast av menniskjum, sum vilja og evna at bróta upp úr nýggjum innan teirra yrki og áhuga.

Onkur hevur sagt, at fólk, sum ikki skara framúr, bert tosa um onnur fólk – tey, ið eru eitt sindur yvir miðal, tosa um hendingar, meðan tey, sum eru í fremstu røð, og sum skapa nakað í teirra samtíð, tosa um visiónir og framtíðarætlanir.

Sum so mangt annað her í verðini er hetta ein sannleiki við avmarkingum – uppgávurnar hjá fólki eru jú so ymiskar, og vit eru væl øll ein samanseting av øllum teimum trimum nevndu sløgum av fólki – men greitt er, at Klaksvík í dag, kanska meir enn nakrantíð, hevur tørv á og dúvar upp á virkisfýsni og dugnaskap hjá okkara oddafólkum á teimum ymisku økjunum.

Vit ynskja at skapa trivna fyri okkara borgarar og framburð til økið okkara – tí liggja stórar ætlanir fyri framman, men kappingin er hørð, og fyri summar tættir í samfelagnum verður hon enn harðari undir nýggju umstøðunum á samferðsluøkinum.

### Býráðið er við at leggja lunnar

Sum býráð kunnu vit í fleiri førum vera við til at ávirka partar av teimum málum, ið leika á – einamest við at leggja lunnar undir virksemi, sum er. Tá tað er gjørt, situr politiska leiðslan spent og fylgir við, hvussu leikur fer á ymsu økjunum.

Inniliga vón og ynski mítt sum borgarstjóri er, at tað kommunala økið verður lyft í felag. Her hendir tann broyting, at samansjóðingin av Norðoyggjum til ein enn dyggari leiklut í framtíðini, har allir partar lyfta í felag, soleiðis at Norðoyggjar eisini í komandi tíðum fer at verða ein kraftmiðdepil – eitt samfelag við framburði og trivnaði í hásæti.

### Góða Norðoyastevnu

Nú tað stundar til Norðoyastevnu, er øllum greitt, at summarið er komið. Hóast kalt hevur verið í veðrinum seinastu tíðina, forðar tað ikki sólini at koma hægri upp á himmalin og fáa tað at spretta og spíra. Saman við summarvøkstrinum og flytifuglunum setir eisini summarítróttin nú dám á dagliga lívið, og sum vant verður fyrsta skotið til FM-kappróðurin latið av á Norðoyastevnu.

Við einari fjølbroyttari norðoyastevnuskrá ynski eg vegna Klaksvíkar bý at bjóða norðoyingum og gestum øllum at verða hjartaliga vælkomnum til Klaksvíkar.

Verið hjartaliga vælkomin á Norðoyastevnu 2007

*Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri*

---

# Hvør rør skjótast á norðoyastevnu?

Nú er umsíðir komið hartil, at teir mongu rógvararnir kring landið fáa sín fyrsta róður í ár, nú norðoyastevnan stendur fyri framman.

Sjálvandi er ikki so lætt at meta um hvørjir vera favorittar, nú ongin bátur hevur róð nakra stevnu enn.

Men heimasíðan hjá Árnafjarðar Kappróðrarfelagi (www.arf.fo) hevur kortini gjørt sína meting til norðoyastevnuna, um hvørjir tríggir verða teir fremstu inn um málstrikuna.

Metingin teirra er henda:

5 mf. dreingir:
Sílið-Blikur-Jallurin

5 mf. gentur:
Hvassi-Sílið-Blikur

5 mf. kvinnur:
Ørnin-Fípan fagra-Sílið

6 mf. kvinnur:
Óvist um nakar róður verður

6 mf. før menn:
Sundabáturin-Strálan-Tvørabáturin

8 mf. menn:
Ørvur-Árnfirðingur-Heiðabáturin

10 mf. menn:
Eysturoyingur. Óvist er enn, hvussu nógvir bátar verða. Tað sigst at tað vera bara tvey 10 mannafør.

sb.




*Norðoya Sparikassi er høvuðsstuðul hjá Árnafjarðar Róðrarfelagið. Tað sæst ...*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Nýggja deild í Árnafirði

Onkur árnfirðingur kundi freistast at halda, at góðu úrslitini hjá leiðsluni í Norðoya Sparikassa vóru gingin teimum til høvdið.

Inni í nýggja kappróðrarneystinum í bygdini er lívligt virksemi í hesum døgum, men tann ókunnugi kundi lættliga halda, at her var talan um eina nýggja deild hjá sparikassanum.

So er ikki. Veruleikin er, at Norðoya Sparikassi er høvuðsstuðul hjá Árnafjarðar Róðrarfelagi.

Hetta vil peningastovnurin sjálvandi vísa fram, og tí er hetta stóra skeltið fest á kappróðrarneystið.

Spennandi verður hjá felagnum nú leygardagin, tá nýggja áttamannafar teirra "Árnfirðingur" fer at rógva á fyrsta sinni.

sb